## DAGSINS MEINING

# Møguleikar

Uttanlandsnevndin viðger uppskot til nýggjan sjálvstýrisleist. Áhugavert verður at síggja, hvussu fastlæst samgongan er, nú Javnaðarflokkurin sigur seg í ávísan mun kunna taka undir við tilgongdini, men tá vil hava ymsar broytingar. Løgmaður hevur ein trupulleika, og hann eitur framvegis Tjóðveldisflokkurin. Hóast løgmaður ber fram føgur orð um, hvussu týdningarmikið tað er at fáa eina breiða semju og fáa Javnaðarflokkin við, er tað eingin loyna, at kreftir í Tjóðveldisflokkinum vilja einki hava við Javnaðarflokkin at gera. Haturið hjá hesum kreftum móti javnaðarfólki er so stórt, at tær heldur vilja leggja seg á knæ fyri Fólkaflokkinum enn at skula samstarva við Javnaðarflokkin.

Og nettupp hetta er knúturin í føroyskum politikki. Tjóðveldisflokkurin hevur síðani formansskiftið fullkomiliga negligerað Javnaðarflokkin og hevur við floksapparati sínum gjørt alt fyri at háða og tváa flokkin og formann hansara. Hóast formaðurin letst sum hann virðir demokratiið, stendur hann kortini á odda fyri einum flokki, sum javnsetir javnaðarfólk við quislingar og landasvíkjarar. Hvussu skal samstarv spyrjast burtur úr slíkum hugburði! Lagnunnar speisemi er tað eisini, at eingin hevur verið meira víðgongdur í hesi herferð móti javnaðarfólki enn formaðurin í Uttanlandsnevndini, sum nú skal eina finna skilagóða og breiða loysn, um vit skulu ganga eftir orðum løgmans.

Tað má hugburðsbroyting til í Tjóðveldisflokkinum skal hann koma á tal aftur við Javnaðarflokkin. Skal nakað henda á sjálvstýrisleið, er tað einasti útvegurin. Tað kann henda, at Tjóðveldisflokkurin setur seg uttan fyri ávirkan í føroyskum politikki, um hann ikki sannar hetta. Tað er tó greitt, at fer Sambandsflokkurin at halda fram við gomlu sambandslinjuni, vil tað koma væl við hjá Tjóðveldisflokkinum. Tí tá verður ringt hjá Fólkaflokki og Javnaðarflokki at hava nakað við Sambandsflokkin at gera. Og tað kann tvinga Fólkaflokkin saman aftur við Tjóðveldisflokkinum. Vil Sambandsflokkurin ikki innsíggja, at meiri sjálvstýri er einasta leið, verður hann orsøkin til, at núverandi samgonga kann halda fram eftir valið. Hvør enn verður formaður í flokkinum eigur hann at gera sær hetta greitt. Tað er neyvan nakar ivi um, at hevði Sambandsflokkurin flutt seg meira á sjálvstýrisleið, hevði ynskisamgongan hjá løgmanni verið A,B og C. Nógvir fólkafloksmenn høvdu fegnir viljað skift út E við B. Gevast tjóðveldismenn ikki við sínum haturi til Javnaðarflokkin, kunnu teir lættliga koma at seta seg sjálvan uttan fyri alt vald.

**Sosialurin**

# Nýggja telefonbókin komin

SAMSKIFTI
*Eirikur Lindenskov*




Telefonbókin 2001 er nú aftur á gøtuni, men hesaferð verða tað bara fastnettelefonfelagar, sum fáa telefonbókina ókeyps frá Føroya Tele. Tey, ið hava fatelefon, mugu hesaferð keypa telefonbókina fyri 50 krónur.

Føroya Tele sigur í tíðindaskrivi, at út við 27 túsund telefonbøkur verða bornar út, og hetta verður avgreitt í vikunum 13 til 15.

Sum grundgeving fyri, at fartelefonfelagar ikki fáa telefonbókina, sigur Føroya Tele, at tað í framtíðini verður møguligt at leita eftir telefonnumrum v.m. beinleiðis frá fartelefonini og á internetinum.

Annars eru onkrar smávegis broytingar gjørdar frá seinastu útgávu. M.a. eru felagatreytir nú prentaðar í bókini og kápan er eisini broytt nakað. Per á Hædd, fotografur, hevur tikið myndirnar, sum ímynda ymiskar kundastøður.

Telefonbókin 2001 er prentað í 33.000 eintøkum. Tað er Prentsmiðjan Oddi hf. í Reykjavík, sum hevur havt prentingina um hendi. Bókin er 32 síður størri enn seinasta útgávan og telur nú 592 síður. Økta síðutalið kemst serliga av at fleiri virkir og stovnar lýsa í Gulu síðunum fyri á henda hátt at geva seg til kennar.

Annars verður Telefonbókin 2001 at fáa til keyps í Telebúðunum kring landið og á Tænastumiðstøðini. Bókin kostar 50 krónur við bleytari permu. Í ár eru framleiddar 1000 bøkur við harðari permu. Hesar vera at fáa til keyps fyri 100 krónur eintaki.

Aftur í ár hava viðskiftafólk vent sær til Føroya Tele við uppskotum til broytingar í Telefonbókini. Hóast ikki øll hugskotini eru brúkt í nýggju útgávuni eru tey á Føroya Tele sera takksom fyri øll uppskot og allar viðmerkingar til telefonbókina, og tey siga seg vóna, at Telefonbókin 2001 eisini verður eitt hent uppslagsamboð hjá øllum føroyingum.

# Sundsvegurin fullkomiliga broytast

FERÐSLA
*Ferðslutrygd www.info.rff.fo*

Tórshavnar Kommuna hevur gjørt ymiskt seinastu tvey árini við Sundsvegin, sum fólk kæra seg nógv um framvegis. Tveir nýggir gonguteigar á horninum millum Ringvegin og Sundsvegin við gonguteigaljósum og skeltum eru komnir.

Harafturat er Sundsvegurin og gongubreytin asfalterað. Marius Müller, tekniskur stjóri hjá kommununi, sigur, at fyri at bøta um ferðslutrýstið á Sundsvegnum, hevur kommunan ætlanir um at føra Sundsvegin oman í verandi rundkoyring við endan á R.C.Effersøesgøtu. Eisini er ætlanin at gera ein veg úr Sundsvegnum yvir í Villingardalsvegin og eina rundkoyring við Sundsvegin/Óluvugøtu. Hesi arbeiði verða væntandi gjørd samstundis, sum Berjabrekka 3-ætlanin verður framd, sum m.a. umfatar bygging av uml. 120 íbúðm.

# Ópersónligar fotofellur

FERÐSLA
*Ferðslutrygd www.info.rff.fo*

Fleiri av løgreglumonnunum tykjast ikki so harmir um, at vit í Føroyum ikki hava sokallaðu fotofellurnar. Ein fotofella virkar soleiðis, at eitt upptøkutól automatiskt tekur mynd av bili við førara, – og dagin eftir fær førarin myndina í postinum við upplýsing um, hvussu skjótt hann koyrdi, tá ið myndin varð tikin.

Førarin kemur ongantíð í samband við løgreglu ella vegamyndugleika, men tekur støðu til eina mynd og eini kravboð í postinum um t.d. eina bót.

Fleiri av føroysku løgreglumonnunum innan ferðsluna halda, at persónliga sambandið millum løgreglu og bilførarar hevur nógv størri týdning og ávirkan

á atburðin í ferðsluni, enn elektrónisk eftiransing sum eitt nú fotofellur.

## Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum tykkum, ið á ymiskan hátt vístu samkenslu og ógloymandi hjálpsemi, tá ið elskaða dóttir mín og systir okkara

**Birita Persdóttir Hansen**

doyði og varð jarðað. Tøkk øll tit, ið vóru so góð við Biritu

**Ása**

†

Kunngjørt verður fyri ætt og vinum, at okkara høgt elskaði maður, pápi, verpápi og abbi

**Poul Nicolaj Jacobsen**
ættaður av Glyvrum
búsitandi í Tórshavn

andaðist hósmorgunin 22. mars, 73 ára gamal. Kistan fer úr Kapellinum á Landssjúkrahúsinum leygardagin kl. 16.00. Jarðarferðin verður úr Havnar Kirkju sunnudagin kl. 14.00.

*Fyri tey avvarðandi*

**Asta, Sigrun, Djóni og Marianna**

Sosialurin

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:**
Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:**
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Tíðindaleiðari:**
Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo
**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Marjun Dalsgaard marjun@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
John Johannessen john@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo

Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
**Mentan:**
Birgir Kruse birgir@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1
700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Útgevari/uppseting:**
Sp/f Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.



# Tórshavnar Sløkkilið fingið nýtt tól

*Birita Andreasen*




Tólið, sum kann síggja í myrki

Mynd: Jens K. Vang

Tórshavnar Sløkkilið hevur saman við tryggingarfeløgunum keypt nýtt tól, ið ger tað møguligt at finna fólk og skaðar í bølamyrkri.

Tólið er fyrst og fremst keypt til at bjarga mannalív, men afturat tí so er tað sera hent at hava, tá ið tað kemur til fjaldar rørskaðar og annað, sum er ómøguligt at síggja við berum eyga. Hetta fer at lætta munandi um arbeiðið hjá sløkkiliðinum.

Á støðini hjá Tórshavnar Sløkkiliði var hósdagin framsýning, fyri at vísa hvussu tólið virkar. Eitt nú bleiv man sleptur inn í eitt rúm, sum var fult av royki. Ógjørligt var at síggja fram um nøsina. Men tók ein brillurnar uppá, so var beinavegin møguligt at síggja eitt fólk í einum horni í rúminum.

Tólið, sum kallast Fire Flair, er amerikanskt. Peter Seloy, sløkkjuliðsstjóri, sigir frá at hann mátti skriva undir eitt skjal frá bretska verjumálaráðharranum, um at tólið ikki skuldi nýtast til nakað hernaðarligt endamál, og at hann sjálvur var endaligi brúkarin. Tað vil siga at hann ikki vildi selja tólið víðari.



*Soleiðis sær fólk út gjøgnum nýggju brillurnar hjá sløkkiliðnum*

Mynd: Jens K. Vang

### Tryggingarfeløgini

Tólið er saman við sløkkiliðnum, fíggja av Tryggingarfelagnum Føroyar og

### Trygd

Peter Seloy greiðir frá at tólið kann skerja umfangið av eitt nú rørskaðum, á tann hátt at tað verður gjørligt at síggja hvar nágreiniliga skaðin er. Sostatt verður man førur fyri at avmarka skaðan munandi, og sleppur undan at bróta óneyðugt upp. Við hesum vilja tryggingarfeløgini eisini minka um teirra útreiðslur.

### Framkomin tøkni

Saman við nýggja tólinum hevur sløkkiliðið eisini fingið nýggja roykkavaraútgerð. Hetta eru brandhjálmur og trýstluftsamboð, ið ger tað gjørligt hjá einum sløkkiliðsmanni at vera longri enn áður, inni í einum rúmi sum er fult av royki.

– Hendan tøknin tekur okkum frá sjeytiárunum, beint inn í ár 2000. Her hava vit ongantíð áður verið, sigur sløkkiliðsstjórin. Hann leggur síðani afturat, at tólið er eitt frálíkt hjálparamboð til ein vælvandan sløkkiliðsmann, men at tað ikki kann setast ístaðin fyri nakað annað.

